# SKEMT 2000

## fæst í sølubúðunum kring alt landið
## Kostnaður 120,-





**Enn er møguleiki fyri at ogna sær allar 12 SKEMT bøkurnar í signeraðum eintøkum fyri ein samlaðan prís á einans kr. 650,-**

**Bíleggið nú og tit fáa tær sendandi beinanvegin. Ringið til Sosialin á tlf. 31 18 20**

Sosialurin - 311820




**Starv**

# Ferðslusamskipari

Ein av stóru avbjóðingunum hjá Strandfaraskipum Landsins er at hækka tænastu- og góðskustøðið innan fólkaflutningin. Í hesum sambandi verður søkt eftir einum ferðslusamskipara til fólkaflutningsdeildina, t.e. Oyggjaleiðir og Bygdaleiðir.

Tað er ynskiligt, at tann, sum settur verður kann byrja skjótast gjørligt.

**Uppgávurnar hjá fólkaflutningsdeildini**
Fólkaflutningsdeildin skal veita eina úrslitagóða fyrisiting innan fólkaflutningstænastu, herundir samskipa, viðlíkahalda og menna stýringina innan fólka- og akfarsflutningin hjá fyritøkuni.
Virksemið á deildini fevnir um hesar høvuðsfunktiónir:

- Planlegging
- akstur (skip og bussar)
- Ferðslusamskipan
- Ferðaseðlasamskipan

**Uppgávur hjá ferðslusamskiparanum**
Høvuðsuppgávan hjá ferðslusamskiparanum verður at tryggja eina effektiva tilrættalegging og samskipan av dagliga fólkaflutninginum innan Bygdaleiðir og Oyggjaleiðir.

Uppgávurnar hjá ferðslusamskiparanum verða m.a.:

- Samskipa, stýra og hava eftirlit við dagliga fólkaflutninginum
- Fyrisita koyri- og vaktarskipanir
- Eftirlit við koyrisáttmálum
- Fyriskipa bíleggingar
- Gera flutningsavtalur
- Verða við í arbeiðinum at gera ferðaætlan
- Innan- og uttanhýsis samstarv og samskifti.

**Førleikakrøv**

- Útbúgving innan ferðslustýring e.l.
- Kunnleiki og royndir viðvíkjandi flutningsskipanum
- Góðan kunnleika og royndir innan edv á brúkarastøði
- Kunnleiki til formlig krøv innan rakstur av ferðamannaskipum og akførum er ein fyrimunur
- Málrættaður
- Góð leiðslu- og samstarvsevni
- Góð evni at orða seg bæði skrivliga og munnliga á føroyskum, donskum og enskum.

**Setanartreytir**
Talan er um eitt starv við spennandi avbjóðingum, har ferðslusamskiparin skal vera við til at víðari menna hesa funktión. Starvið gevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

Vakt eftir vanliga arbeiðstíð.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggarmálastýrið og avvarðandi fakfelag.

**Umsóknir**
Umsókn við próvskjølum skal sendast til:

***ran ara k an n***
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 1. august 2001.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Poul Jákup Thomsen,

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

**STRANDFARASKIP LANDSINS**


# GALLAVEITSLA

Fyri kappróðrafólki 18. august í Batmintonhøllini

Mint verður á at seinasta freist at gjalda er 25. juli á konto 6460-162.919.2 í Føroya Banka

**Tilmeldingarlistin skal sendast til fax 317743 í seinasta lagi 25.juli. Minnist til at viðmerkja navn og bát tá goldið verður**

*Við róðrakvøðu*

**Róðrarfelagið Knørrur**


# Frá Hvalbiar Skúla

Hesi størv eru leys at søkja skúlaárið 2001/2002. Størvini eru lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokki 18.1 til 27.4.

1 starv 26,5 t/v fyri lærara í farloyvi. Tann, ið settur verður, skal undirvísa í donskum 8. og 9. fl., rokning 4. fl., nátt. & tøkni 4. fl., handverk 4. fl., dreingjaítrótt 4. og 5. fl. og skúlavegleiðing.

1 starv 16 t/v. Undirvíst verður í rokning 1. og 6. fl., danskt 4. fl., landalæru 7. fl. og ítrótti.

Umsóknir til størvini skulu vera Hvalbiar Skúlanevnd í hendi í seinasta lagi 26. juli 2001.

**Hvalbiar skúlanevnd**
v/ Conny Poulsen
Tlf. 375 242
850 Hvalba

**Søkt verður eftir**

# fólki at arbeiða í Danmark

Vit róknast eftir timburmonnum, menn vanir at smíða og arbeiðsmonnum. Eisini verður søkt eftir bátasnikkara/snikkara at innrætta ein, møguliga fleiri bátar.

Áhugað kunnu ringja til

**Sp/f FÆR BYG**
Mobil +4520716223 & +4520716224



# Kommunuskrivstovan í Gøtu

verður stongd vegna summarfrí í tvær vikur – frá 23. juli til og við 3. august.

Rest av august mánaða verður bert opið fyri avgreiðslu

**hósdagar**
**kl. 10–12**
**kl. 14–18**


**KIA CARNIVAL**

**2.9 Dohc Turbo-Diesel16 V, 126 HK, 5 hurðar**



**Rætti bilurin til mong endamál.**
**Pláss fyri 7 fólkum og hópin av viðføri.**

*D. B. Bilar*

**Tel. 310 600**